

www.oljan.fo

**Jan Müller** 23 - 02 - 2013

# Eingin kinesiskur áhugi fyri Grønlandi enn

Enn hevur ikki ein einasti íleggjari í Kina sagt ja til at gera ílgøgur í tað nógv umrødda jarnnámið, sum felagið London Mining skal fara undir norðan fyri Nuuk. Tað segði forstjórin í London Mining, Greame Hossie, í sendingini Deadline hjá DR 2 í gjárkvøldið. Verkætlanin hjá London Mining hevur fingið nógva umrøðu, serliga í Danmark, har hon hevur elvt til kjak millum stjórnina og andstøðuna. Danski Fólkaflokkurin og Vinstri eru alt annað enn fegnir um, at kinesiskir íleggjarar skulu fíggja ta stóru verkætlanina, og at ætlanin er at brúka bíliga kinesiska arbeiðsmegið í náminum. Stjórnin sigur, at tað eru grønlendingar, sum hava ræðið á ráevnunum. Men sambært Greame Hossie hevur eingin kinesiskur íleggjari, hvørki einstaklingar, fyritøkur ella fíggingarstovnar, sagt seg vera til reiðar at seta pengar í jarnnámið. Ikki fingið svar Í DR-sendingini segði London Mining-forstjórin, at felagið hevur tingast við fleiri íleggjarar, eisini kinesiskar, men at felagið minni enn so hevur fingið tær 2,5 milliardir dollararnar, sum tað fer at kosta at fremja verkætlanina í verki. Tað var í juni í fjør, at London Mining, sum er bretskt felag og skrásett á virðisbrævamarknaðinum í London, søkti grønlendska landsstýrið um loyvi til at byrja eitt jarnnám 175 kilometrar norðan fyri Nuuk. Enn hevur felagið ikki fingið svar. ?